Enekk aftur á palli:

# Ein sonn fragd fyri oyrað

**Fyri fyrstu ferð í langa tíð var bólkurin Enekk aftur savnaður á palli mánakvøldið. Teir borðreiddu við teirra eyðkenda tónleiki, og var tað ein fragd fyri bæði eygu og oyru at síggja og hoyra teir spæla aftur**

*Enekk hevði konsert í Norðurlandahúsinum mánakvøldið. Við Kára Sverrisyni á odda førdi bólkurin áskoðarafjøldina gjøgnum hálvan annan tíma av framúr góðum tónleiki*
*Mynd: Finnur Justinussen*



UMMÆLI
*Ingrid Bjarnastein*

Bólkurin Enekk, sum ikki hevur verið at sæð á palli í langa tíð, hevði mánakvøldið konsert í høllini í Norðurlandahúsinum í sambandi við Listastevnuna og í sambandi við, at 25 ár eru liðin síðani plátufelagið Tutl varð stovnað.

Sjálvt um bólkurin ikki hevur verið nógv at sæð til seinastu árini, tóktist tað ikki, sum áhugin var so stórur fyri bólkinum. Men tó. Høllin var eitt sindur meira enn hálvfull.

Tað, sum vanliga verður kallað, føroyskt presisheit var ikki handhevjað á konsertini, tí byrjað varð stundisliga – so stundisliga, at aftaná fyrsta lagið komu fólk sníkjandi inn í salin, tí tey vóru ov sein.

Birgir Kruse, formaðurin í stýrinum fyri Listastevnuna bjóðaði vælkomin, og bað fólk um at sløkkja fartelefonirnar, so hvørki tónleikarar ella áhoyrarar vórðu órógvaðir meðan konsertin var. Og hetta vísti seg at rigga væl, tí ongin fartelefon var at hoyra ígjøgnum alla konsertina – eitt stórt herðaklapp til publikum.

Síðani fór rullan ígongd. Konsertin, ið Enekk hevði valt at kalla »Meðan vit nærkast jørðini«, byrjaði við, tangentleikaranum, Óla Olsen. Í myrkrinum í høllini sótu øll í andakt og lurtaðu, spent uppá, hvat fór at henda. Og meðan eyguni so spakuliga vandu seg við myrkrið, byrjaði tónleikurin at ljóma saman við flyglinum. Spakuliga, men støðugt komu tey ymsu ljóðførini inn, og áðrenn tú visti av, sást tú allar tónleikararnar har frammi á pallinum. Ein góð byrjan til nakað, ið síðani vísti seg at vera ein framúr góð konsert.

## Friðarligt

Um einum dámar tað meira villa slagi av tónleiki ella um ein er til buldur og brak, so er Enekk ikki tann rætti bólkurin.

Konsertin var merkt av friðarliga tónleikinum hjá bólkinum í stílinum, sum Enekk kallar fólka-jazzur.

Hugtakandi var at síggja, hvussu tónleikararnir spentu seg út á teimum ymsu ljóðførunum.

Rógvi á Rógvu á trummum og percussion spenti seg veruliga út, og vísti, at hann man vera ein av teimum, ið megnar best at meistra trummupinnarnar her á landi. Tað var spennandi at síggja, hvat kort trummuspælarin fór at toga úr ermuni. Umframt trummur brúkti Rógvi nógv percussion ljóðføri, sum gjørdi, at dámurin og ljóðið gjørdist á ein hátt etniskt og ógvuliga livandi.

Umframt trummuspælara var eisini gittarspælarin, Heðin Z. Davidsen. Og eisini megnaði at vísa síni gittarkynstur.

Aftanfyri eina yvirvaksna violin, sum fólk annars vanliga kalla ein kontrabass, stóð Mikael Blak. Ein ungur tónleikari, sum eisini dugir at spæla meira enn tað eina ljóðførið.

Onglendingurin, Pete Tilley, blásti í eitt ljóðføri, sum eitur didjeridoo. Eitt rør, sum tá blást ella tosað verður niður í tað, gevur ljóð frá sær.

Og handan mikrofonina og við kassagittara í hond var Kári Sverrison.

Henda samansetingin av monnum var ein sera spennandi cocktail, ið fekk fólk at sita sum rúnarbundin tann góða tíman konsertin vardi.

## Eykaløg

Nógv nýtt tilfar var at hoyra á konsertini, men í sama góða og gamla Enekk stíli. Eisini vóru instrumental løg, og enntá eisini eitt bulgarskt lag at hoyra.

Tónleikararnir vóru avslappaðir á pallinum, og hetta gjørdi framførsluna róliga og líkatil. Onki hóvasták var gjørt burturúr nøkrum, og tónleikararnir, ið til tíðir kundu tykjast lítillátnir kundu fáa tað at tykjast ikki nógv verri enn at byggja eitt putlispæl at spæla á hesi ymsu ljóðførini.

13 løg vóru á skránni hjá bólkinum, og aftaná hesi trettan komu ungar gentur í føroyskum klæðum á pallin og góvu tónleikarunum blómur. Og ikki nóg mikið við tí. Eisini Kristian Blak úr Tutl fekk handað blómur í sambandi við 25 ára føðingardagin.

Men Enekk slapp ikki so. Áskoðarafjøldin, sjálvt um hon ikki var so stór, sum ein kundi væntað, dugdi hóast alt at klappa tónleikararnar innaftur.

Og hesuferð fóru Kári Sverrison og hinir yvir til skjaldrini, og er hetta nakað, ið eisini eyðkennir bólkin. Men tey, ið hildu, at nú var sloppið, máttu halda einaferð afturat. Tí lítið hjálpti, at tónleikararnir hvurvu av pallinum aftaná eykalagið. Lógvabrestirnir, trampini og rópini vóru so hørð, at teir høvdu helst ikki nógv annað í at velja enn at koma inn aftur á pallin.

»Aja, man kann altíð spæla eitt lag afturat«, segði Kári Sverrison, og rópti síðani restina av manningini inn á pallin. Hetta seinna eykalagið gjørdist eisini seinasta lagið á konsertini, sum til endans vardi góðan hálvan annan tíma.

Kvøldið var at enda komið, og aftaná kundi fjøldin ikki annað enn staðfesta, at konsertin hevði verið framúr góð. So er bara eftir at vóna, at Enekk vera oftari at síggja á palli í framtíðini.



# Framúr gott ár hjá Varðanum



*Tað loysti seg at fiska í 2001. Ovurstóru nøgdirnar av svartkjafti og øðrum pelagiskum fiski slóðaðu fyri einum frálíka góðum ári hjá størsta partinum av vinnuni*

**86 milliónir stóðu eftir hjá P/F Varðanum, sum eigur Trónd í Gøtu, tá øll høvdu fingið sítt**

ÁRSÚRSLIT
*Heri á Rógvi*

Tað gongur gott hjá føroysku nótabátunum. Ella rættari sagt tað gekk ógvuliga gott í 2001. Ikki minst hjá P/F Varðanum, sum eigur Trónd í Gøtu, Finn Fríða og Saksaberg. Hesi bæði seinnu skipini eiga dótturfeløg hjá Varðanum.

Heili 86 milliónir kr. stóðu eftir hjá Varðanum, tá alt var farið av og yvirskotið gjørt upp. Í 2000 var avlopið 4,7 mió. Fiskiskapurin hjá øllum skipunum hevur roynst væl, men framúr góða úrslitið skyldast einamest, at felagið hevði stóran vinning við sølu av partabrøvum. Nevnast kann, at vinningurin hjá Varðanum er størri enn hann hjá Føroya Tele og øðrum stórum fyritøkum.

Skatturin til tað almenna var 18 mió. í 2001.

Roknað verður ikki við, at árið í ár verður eins gott og í fjør, men á góðari verður tað mestur, sambært fráboðan frá felagnum.

Jákup Sólstein, formaður í felagnum Nótaskip, sigur, at sum heild royndist 2001 væl fyri nótaskipini.

– Tað var fyrst og fremst tí, at tað vóru so ógvuliga stórar nøgdir av serliga svartkjafti og eisini makreli, sigur Jákup Sólstein.

Fiskaprísirnir hava verið høgir, men tað er fyrst og fremst stóru nøgdirnar, ið hava slóðað fyri góða úrslitinum hjá nógvum av skipunum.

Nótaskip royna eftir pelagiskum (uppisjóvar) fiskasløgum, og tað hevur eydnast stak væl í fjør, men í ár er úrslitið eitt sindur slakari. Eitt nú sildin fæst tað minni fyri í ár. Eisini er hámark sett á kvoturnar, soleiðis at skipini í ár »bert« kunnu fiska 200.000 tons av svartkjafti. Veiðan í fjør lá omanfyri 265.000 tons.

Jákup Sólstein vísir á, at við pelagiskum fiskasløgum, so er tað ógvuliga skiftandi, hvussu árini roynast.

## Topp 25

Skeita vit at topp 25-listanum yvir føroyskar fyritøkur í 2001 sæst, at árið 2001 ikki var tað bíttasta fyri føroyskt vinnulív. Tað er bussiness-line.fo, sum hevur gjørt listan. Listan skal takast fyri stórum fyrivarni, tí enn manglar ein stórur partur av roknskapinum at verða lagdir inn á skipanini. Tó líkist listin sær sjálvum higartil. Á ovastu rók er sum vant Føroya Banki, ið við sínum 168 mió. kr. í yvirskoti í 2001 neyvan verður tikin av ræðið á vunnu rókini.

Minstamark higartil er 7,9 mió í vinningi, sum P/F Fútaklettur higartil eigur. Enn vanta góðir 900 roknskapir. Roknast kann eitt nú við, at eitt felag sum Christian í Grótinum vinnur eitt sæti á listanum.

Tað er einki at taka seg aftur í, at stóru reiðaríini eiga fylla ein stóran part av listanum. Ikki tí góða gongdin í búskapinum smittar av á øll, og tænastusektorurin hevur so sanniliga eisini notið væl av gongdini í samfelagnum. Við te imum tjúgu prosentunum í partafelagsskatti, so fær landskassin eisini sín ágóða av góðu gongdini.

Vit prenta listan her á síðuni.

## Topp 25

1. **P/F FØROYA BANKI**
Húsagøta 3, 100 Tórshavn
2. **P/F VARÐIN**
Gróthúsvegur 19, 188 Hoyvík
3. **P/F FØROYA TELE**
Tinghúsvegur 3, 100 Tórshavn
4. **P/F SMYRIL-LINE**
J. Broncksgøta 37, 100 Tórshavn
5. **P/F FØROYA FISKAVIRKING**
100 Tórshavn
6. **P/F FØROYA SHELL**
Viðarnes, 100 Tórshavn
7. **P/F SKIPAFELAGIÐ FØROYAR**
Eystara bryggja, 100 Tórshavn
8. **P/F KRÚNBORG**
Marknagilsvegur 19, 100 Tórshavn
9. **P/F BAKKAFROST**
625 Glyvrar
10. **P/F SMS**
Á Trapputrøðni, 100 Tórshavn
11. **P/F STATOIL FØROYAR**
Rundingur, 100 Tórshavn
12. **P/F VESTTROL**
350 Vestmanna
13. **P/F VESTURBÚGVIN**
350 Vestmanna
14. **P/F HAVSBRÚN**
530 Fuglafjørður
15. **P/F KROSSBREKKA**
510 Gøta
16. **SP/F FRÁ 2/11-1998**
350 Vestmanna
17. **P/F ÍSBORG**
Traðagøta 39, 160 Argir
18. **P/F BOÐASTEINUR**
530 Fuglafjørður
19. **P/F OGNARFELAGIÐ 1980**
100 Tórshavn
20. **P/F MEÐALSBREKKA**
350 Vestmanna
21. **P/F VÓNIN**
Bakkavegur 22, 530 Fuglafjørður
22. **P/F DRIFTIN**
510 Gøta
23. **P/F FAROE SALMON**
Kjalarvegur 19, 700 Klaksvík
24. **P/F ATLANTIC AIRWAYS**
Vága Floghavn, 380 Sørvágur
25. **P/F FÚTAKLETTUR**
360 Sandavágur

*Kelda: www.business-line.fo*

** Listin er samansettur av teimum roknskapum, ið eru komnir inn higartil fyri 2001.*

# LISTASTEVNA FØROYA 2002

## Beowulf, Edda og Sjúrður

LISTASTEVNAN
*Tíðindaskriv*

Nú setir Listastevnan sjøtil á stóru sagnirnar. Tær um Sjúrð, sum vá á Orminum, um bannaða gullið úr Rín og um Beowulf. Hetjur úr farnum tíðum, sum hava livað á mannamunni her hjá okkum og aðra staðni við.

– Men er samband millum hesar søgur? Hava tær kanska felags upphav? Ella kunnu tær á annan hátt tvinnast saman?

Hósdagin klokkan 17 í Klingruni í Norðurlandahúsinum fer íslendski lektarin Heimir Pálsson at greiða frá um Eddukvæðini, sum íslendingar skrivaðu um ár 1275. Heimir sigur eisini frá um granskingarúrslit og hugleiðir um mál og viðurskifti, sum kunnu tykjast ógreið, men sum hann tó hevur eitt boð um.

Ein hugsan hansara er, at kvinnurnar hava hildið lív í søgunum, meðan menninir hava verið í bardaga. Heimir Pálsson hevur verið ráðgevi hjá New York bólkinum Sequentia í sambandi við Edduframførslur kring um í Heiminum.

Fríggjadagin klokkan 17 í Klingruni í Norðurlandahúsinum fer Eyðun Andreasen, professari og dr. phil., at samanbera søgurnar í íslendsku Eddukvæðunum við føroysku Sjúrðarkvæðini. Eisini samanber Eyðun málsligan og annan skyldskap millum føroyska kvæðayrking og norrøna skaldskapin á bundnum máli. Fyrilesturin verður eisini hildin í Klaksvík sunnudagin klokkan 16. Eins og fyrilesturin hjá Heimi Pálssyni, er fyrilesturin hjá Eyðuni Andreasen knýttur at stóru Eddu-framførsluni hjá Sequentia, sum verður í Høllini í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið og sunnukvøldið, bæði kvøldini klokkan 19.30.

Hóskvøldið klokkan 19.30 fer Benjamin Bagby at framføra leikin »Beowulf« á gamla Meiarínum í Havn. Benjamin Bagby, sum er leiðarin í leikbólkinum Sequentia, spælir og kvøður hetjukvæði Beowulf, við hørpu og dolki. Hetta er einasta søgnin, sum er varðveitt á fornenskum máli. Beowulf er hetjan, sum skal hjálpa danska konginum Hrothgar í stríðnum móti ódjórinum Grendel.

Leygarkvøldið og sunnukvøldið verður boðið til finaluna á Listastevnu Føroya 2002. Tá fer New York bólkurin Sequentia undir leiðslu av Benjamin Bagby at framføra »Edda«, bæði kvøldini klokkan 19.30. Hetta er stórsta tekniska avbjóðing, Norðurlandahúsið hevur verið fyri, síðani húsið varð tikið í brúk fyri skjótt tjúgu árum síðani. Umframt altskyns talgilda tøkni, skulu jarnbreytarskinnarar festast í gólvið.



*P/F Føroya Banki liggur ovast á rókini á føroyska »Topp 25«-listanum fyri 2001*